# rini

oyingum og starvsfólkunum á heiminum tillukku við degnum.

- Eg veit ikki rættiliga, hvussu tað ber til. Men tað má vera eitt sera gott slag sum kemur higani úr Eysturoynni, segði løgmaður, sum sjálvur er hálvur eysturoyingur.

Hann vísti á, at síðani hann gjørdist løgmaður í februar mánaði í fjør so hava trý fólk rundað tey hundrað árini – og hava tey øll verið úr Eysturoynni: Carl Jacob Sigvardsen í Gjógv, Mia á Støðini í Gøtu og nú Frida Jacobsen úr Leirvík.

Løgmaður dugdi heldur ikki at siga, hvør loyndardómurin var til henda veruleika.

- Kanska er tað hitt góða umhvørvið í Eysturoynni, ella kanska eru tað teir góðu læknarnir tit hava í oynni. Líka veit eg.

- Men hetta verður kanska eitt evni, sum teir í granskingardeplinum kunnu geva okkum svarið uppá einaferð í framtíðini!



*Jóannes Ejdesgaard undraði seg yvir, hví so nógv 100 ára gomul fólk eru í Eysturoynni. Her heilsar hnan uppá Fridu, meðan systirsonurin, Eivind Hansen lurtar*

## Frammanfyri sína tíð

**Almannaráðharrin, Hans Pauli Strøm** var eisini millum tey, sum høvdu orðið á samkomuni týsdagin.

Hann kom inn á ta stóru ábyrgd, sum Frida hevði havt sum sjómanskona á bygd.

Hon skuldi taka sær av bæði húsi og heimi, meðan maðurin var burturi, og hevði haraftrat víst eitt stórt ídni í arbeiði - m.a. við at binda, seyma oljuklæði fyri fólk og mangt annað.

- Frida er víða kend fyri sín dugnaskap.

- Og eg tori eisini at siga, at Frida kom undir tað vit í dag nevna "sjálvstøðug vinnurekandi", langt áðrenn hetta orðið gjørdist alment brúkt her á landi, segði Hans Pauli.

## Lagt lív til árini

Eitt av slagorðunum hjá Hans Paula á tí politiska leikvøllinum hevur verið ætlanin um ein betraða fólkaheilsu.

Hann var tó sannførdur um, at fólk kundu lært nógv av lívinum hjá Fridu.

- Hon hevur treiskast ímóti ávirkanina av aldri. Og tað hevur hon bæði gjørt og megnað, langt áðrenn nakað var sum æt fólkaheilsupolitikkur, og uttan at ganga í fitness-klubbar, renna kondi, eta ginseng ella aðrar sevjur, sum royna av leingja lívið hjá fólki.

- Eg taki vist ikki munnin ov fullan tá eg sigi, at Frida, hon hevur dugað at lagt lív til árini, heldur enn bara at leggja ár til lívið.

- Tygum og tygara líkar hava hildið hetta samfelagið uppi. Og tí unna vit tykkum væl, nú tygum eru her á Ellis- og Røktarheiminum í Runavík.

- Tað hava tygum so sanniliga uppiborið, - at onkur tekur sær av tær nú, á sama hátt sum tú tókst tær av øðrum fólkum, sum høvdu tørv á tí tá, segði Hans Pauli Strøm.



*Nývaldi borgarstjórin í Leirvík, Fríðgerð Heinesen heilsar uppá Fridu.*

## Kvøða til Fridu

Lag: Lille vakre Anna

Merkisdagur mikil er í dag
her í hesum bý, á hesum stað
jú, mín sann vit vita
leirvíkskonan Frida
100 ár hon rundað hevur nú.

Hjartagóð og mild hon vera man
sanniliga eisini tó kann
avgjørd – so frambera
"hvar ið skáp skal vera!"
eingin ivast hvør ið ræður her.

Hóast farin um tey nítitrý
mangan hon í hylin fór útí
elskaði at ídka
kroppin vildi fríðka
hvat var betri enn ein svimjitúr?

Altíð vælkløð og so sera smart
hetta úr Paris man vera lært
- ei úr Leirvíks túni:
hygg so flottur búni
Frida smurd og hárið sett á stás.

Umsorgan for starvsfólkum hon ber
tá ið illveður um hæddir fer
"Góða ferð tit havi
og mítt ynski – gævi:
tit í øllum góðum koma fram".

Frida royndist kokkur sera væl
enn hon ansar, hvat ið etast skal
matur væl skal smakka
fyri hann tá takka
uttan himpr, tá gagnast hesin væl!

Søgur vilja okkum siga frá
hon ekspertur sós at gera tá
loyndarmál – ei hoyrdi
hvat í grýtu koyrdi
hon, so franskan smakkin sósin bar.

Hóast løtur tungar koma á
lætta sinnið mangan er at sjá
skemtar – og so brosar
tá til okkum tosar
sera takksom fyri alt hon er.

Góða minnið greitt har er at sjá
hevur dugað væl at sagt oss frá:
gingnar eru gøtur
farnar, góðar løtur
Tíð sum fór og aftur kemur ei.

Frida altíð Guds orð hevur kært
hetta hon frá barni hevur lært
lívsleið - ei at skilja
hvíla í Hans vilja
eydkent fyri hana er for víst.

Góða Frida, kvøðu bera nú
vit øll tær úr hesi stóru bú
Sól í vestri roðar
- tað frá morgni boðar
Ævinleikans sól brátt hevjar seg.

7 ár farin síðan dagin tann
Frida inn um hesar dyr sær fann
Vit her vilja siga
ei við tí at tiga:
Frida, hjartans tøkk for hesi ár.

**Heilsan frá bú- og starvsfólki**